**Almanna- og Heilsumálastýrið**
*Starvsfólkadeildin*

# Deildarstjóri til Almanna- og heilsumálastýrið

**Eitt starv sum deildarstjóri í Almanna- og heilsumálastýrinum við tænastu inntil víðari á Fíggjardeildini verður við hesum lýst leyst til setan frá 1. mars 2001 ella eftir nærri avtalu.**

**Talan er um starv, har tann, sum settur verður, sjálvur verður við til at mynda starvið, og har góðir møguleikar verða fyri persónligari og fakligari menning.**

**Høvuðsuppgávur:**

- Ábyrgd av dagligu leiðsluni á deildini.
- Ábyrgd av at fíggjarstýring og fíggjareftirlit verða framd á høgum støði eftir nærri settum reglum á øllum stovnum innan økið.
- Ábyrgd av at fáa til vega virksemishagtøl og skráseting.
- Veita fíggjarliga ráðgeving til stovnarnar innan økið.
- Aðrar fyri starvið viðkomandi uppgávur.

**Krøv til umsøkjaran:**

- Viðkomandi búskaparfrøðislig útbúgving, ella onnur líknandi út-búgving.
- Leiðsluroyndir, nútíðar leiðslueginleikar.
- Kunnleika til almanna-og heilsumál
- Evni at seta í verk fyriskipanir.
- Evni at eggja og menna leiðarar og starvsfólk.
- Góð samstarvsevni.
- Vitan um tær treytir sum eru galdandi í einari politiskari fyrisiting.

**Løn og setanartreytir:**

Tann setti hevur tilvísing til aðalstjóran, og er á linju við hinar deildarstjórarnar í aðalstýrinum.

Setanarøki er alt aðalstýrið við tilhoyrandi stovnum umframt Løgmansskrivstovan og hini aðalstýrini.

Talan er um tænastumannastarv, við setanartreytum sambært løgtingslóg um tænastumenn landsins. Starvið verður lønt í 37.lønarflokki.

**Umsóknir:**

Umsókn við avriti av prógvum, C.V. o.ø. skulu sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
att. Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn.

Umsóknarfreist: 19. februar 2001 kl. 12.00

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Høgna Joensen, aðalstjóra tlf. 30 40 50.

---

**Barnasjónleikarfelagið**
**Dramaverkstaðið**
Hallarheygur 2, FO 100 Tórshavn

# Fremmanda gentan



**Sýningar verða:**
Leygardagin 3. februar kl. 18.00
Sunnudagin 4. februar kl. 16.00
Sunnudagin 4. februar kl. 18.00

**Atgongumerkir:**
Atgongumerkir á 25 kr. kunnu keypast í forsølu í Kunningarstovuni og á Dramaverkstaðnum hálvan tíma undan sýning.
Børn undir 5 ár skulu vera saman við vaksnum.

---

# Norðskála–Oyrar skúli

Innskriving av næmingum til 1. flokk komandi skúlaár verður í skúlanum týsdagin 6. februar kl. 16.00. Havið dóps- ella navnaseðil við.

**Norðskála–Oyrar skúli**
Tlf. 422245

---

Ford Sierra Cosworth
árgang 1992

Til sølu um hóskandi boð fæst.

Tlf. 223 380, 373 680, 373 660



Fartelefon 214865

---

# Skeið fyri húsavørðar í viðlíkahaldi av bygningum

## 1.–2. mars 2001

**Undirvíst verður í:**
Ljósanleggi, lásaskipanum, oljufýri, ventilatiónsverki. Reingerð, reingerðaramboðum og viðlíkahaldsplanlegging.

**Skeiðleiðarar:**
Tummas Lauritsen, TST.

**Skeiðkostnaður:**
kr. 1.250,00 (skal gjaldast við tilmelding)

**Tilmelding:**
áðrenn 23. februar 2001

**Handverkarar kunnu søkja stuðul eftir reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum.**

**Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.**

Umsóknarbløð til Undirvísingar- og Mentamálastýrið og Vitan fáast á skúlanum.

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tlf 311957
(mánadag - fríggjadag, kl. 8-12 & 13-16)

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75, P.O.B. 239,
FO-110 Tórshavn, tlf. 311957, fax 316621
Teldupostur: mb@tst.fo

---

# Almennir fundir

**hjá Kirkjubøar Kommunu í 2001 verða hesar týsdagar kl. 19.30.**

| | |
|---|---|
| 30. januar | 11. september |
| 20. februar | 2. oktober |
| 13. mars | 23. oktober |
| 17. apríl | 6. november |
| 22. mai | 27. november |
| 19. juni | 11. desember |
| 10. juli | |

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdarráðsfundi, skulu verða kommununi í hendi 7 dagar áðrenn fundin.

Frá 1. februar verður kommunuskrivstovan opin óstakar vikur týsdagar frá kl. $16^{00}$–$18^{00}$ .
Fram til summarsteðgin verður skrivstovan í nýggja skúlanum á Velbastað. Opið verður hesar dagar:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 6. februar | 6. mars | 3. apríl | 1. mai | 12. juni |
| 20. februar | 20. mars | 17. apríl | 15. mai | 26. juni |
| | | | 29. mai | |

**Kirkjubøar Sóknar Bygdarráð**

---



# Tiltøk í februar 2001

**HESAR FRAMSÝNINGAR ERU Í HÚSINUM:**

***FRAMSÝNINGIN*** »TANN LÍTLI PRINSURIN« TIL OG VIÐ 4. FEBR. OG

AKVARELLFRAMSÝNINGIN HJÁ KJELL EKSTRÖM, ÁLAND, TIL OG VIÐ 4. FEBR.

**Hósdagur 01. kl. 19.30**
Konsert v/Alexander Vaulin, klaver í **Vestmanna skúla**. Spæld verða verk eftir: N.W. Gade, Stenhammer, Grieg og Ilja Bergh. Fyrirskiparar: Konsertfelagið og Norðurlandahúsið

**Fríggjadagur 02. kl. 20.00**
Føroyskur barnadansur v/Dansifelagnum í Havn

**Leygardagur 03. kl. 21.00**
PRIX - Føroyar **á Strondum**

**Sunnudagur 04. kl. 16.00**
Konsert v/Alexander Vaulin, klaver. Spæld verða verk eftir N.W. Gade, Stenhammer, Grieg og Ilja Bergh. Fyriskiparar: Konsertfelagið og Norðurlandahúsið

**Mánadagur 05. kl. 19.30**
Klipp, filmsklubbi Norðurlandahúsins. Sýndur verður finski filmurin Ambush frá 1999

**Hósdagur 06. kl. 20.00**
Føroyskur barnadansur v/ Dansifelagnum í Havn

**Fríggjadagur 09.–Sunnudagur 11.**
Ung í Føroyum 2001

**Sunnudagur 11. kl. 17.00**
Ungdómsstevnan »Ung í Føroyum 2001« alment tiltak v/dansi, sangi, sjónleiki, filmi, upplestri, teldulist o.ø. framførslum

**Mikudagur 14. kl. 17.00**
Myndlistaframsýningin hjá Bodil Kaalund, Danmark, letur upp

**Leygardagur 17. kl. 16.00**
Konsert v/Havnarkórinum

**Sunnudagur 18. kl. 16.00**
Rytmiskur skúladagur. Konsert

**Hósdagur 22. kl. 19.30**
Orfeus, Musikklubbur Norðurlandahúsins.
Konsert við Øssur Bæk, fiól og Jóhannes Andreasen, klaver. Á skránni verða spæld verk eftir: Beethoven, Poulenc og Schumann

**Fríggjadagur 23. kl. 21.00**
PRIX Føroyar í Klaksvík

**Leygardagur 24. kl. 19.30**
Konsert v/Jessy Dixon

**Mikudagur 28. kl. 19.30**
Fyrilestur um tónaskaldið Hans Jacob Højgaard.
Fyrilestrahaldari: Thomas Andersohn, fil.mag., Svøríki

***Broytingar í skránni kunnu koma fyri.***
***Høvi er at keypa te, kaffi, sodavatn, øl, breyð, køkur o.a. í kaffistovuni.***
***Húsið er opið gerandisdagar kl. 10.00 -18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00.***
***Kaffistovan er opin, tá ið húsið er opið.***

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
e-mail:nlh@nlh.fo · http://www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650

---

**HELSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN**

Debesartrøð
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 315300
Fax + 298 310508
E-mail: feagency@hfs.fo
http://www.hfs.fo

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Hjálparfólk

**Lýsing av arbeiðinum**
Vit sóknast eftir einum hjálparfólki at vera við til at gera kanningar av umhvørviseitri í luft, jørð, vatni og verum.

**Starvslýsing**
Arbeiðið fevnir um at savna saman sýnir, fyrireika hesi og senda tey til kanningar á góðkendum starvsstovum. Tú skalt eisini kunna leggja inn data í datasavn og vera við til at røkja datasavnið. Annað fyrifallandi arbeiði kann eisini blíva aktuelt.

**Krøv til útbúgving og kunnleika**
Tú skalt tíma at fara út í náttúruna at savna saman sýnir, hava hug at arbeiða við kanning av umhvørviseitri, eins og tað er neyðugt at taka serlig fyrilit í handfaringini av sýnunum. Tú mást tí vera ábyrgdarfull/ur, reiðilig/ur og nágreinilig/ur.

Kunnleiki til kemi og biologi er ikki neyðugur, men er tó ein fyrimunur. Tú mást hava koyrikort til bil. Kunnleiki til elektroniska tekst- og dataviðgerð krevst.

Starvið er hóskandi til fólk, sum hava steðg í lesnaðinum ella sum til dømis bíða eftir upptøku við hægri lærustovn.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Tú skalt kunna byrja 1. mars ella 1. apríl 2001. Starvssetanin er avmarkað til eitt ár.

Løn og onnur setanarviðurskifti verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, í 8 lønarflokki, sí heimasíðuna hjá Lønardeildini, www.lnd.fo.

Umsóknir við avriti av prógvi, viðmælum, CV og tílíkum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 20. februar 2001. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Mariu Dam, verkætlanarleiðara.

# Akademikari

**Lýsing av arbeiðinum**
Vit sóknast eftir einum akademikara, sum skal vera við til at kanna umhvørviseitur í luft, jørð, vatni og verum.

**Starvslýsing**
Arbeiðið fevnir um at savna saman og viðgera data og at skriva fakligar frágreiðingar. Í ávísan mun skalt tú eisini vera við til at gera ætlanir fyri innsavnan av sýnum og vera við til at viðgera og fyrireika hesi.

**Krøv til útbúgving og kunnleika**
Tú skalt hava eina náttúruvísindaliga útbúgving og hava góðan kunnleika til enskt mál.

Kunnleiki til kemi og biologi er neyðugur og kunnleiki til (øko-) toksikologi er ein fyrimunur. Best er, um tú hevur koyrikort til bil. Góður kunnleiki til elektroniska tekst- og dataviðgerð krevst. Tú mást vera sinnað/ur at arbeiða saman við øðrum og gjarna vera umhugsin og systematisk/ur.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Tú skalt helst kunna byrja 1. mars ella 1. apríl 2001. Starvssetanin er fyri eitt avmarkað tíðarskeið, fyribils til 31. desember 2001, men møguleiki er fyri at leingja um starvstíðina.

Løn og onnur setanarviðurskifti verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag, sí heimasíðuna hjá Lønardeildini, www.lnd.fo.

Umsóknir við avriti av prógvi, viðmælum, CV og tílíkum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 20. februar 2001. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Mariu Dam, verkætlanarleiðara.

# Starvsfólk til Umhvørvisdeildina

Søkt verður eftir starvsfólki við umhvørvisteknískari ella akademiskari útbúgving til nýtt, fast starv á umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Starvið umfatar yvirhøvur mál innan karmarnar av umhvørviverndarslóggávuni, serliga innan viðgerð av umhvørvisgóðkenningum.

Hetta merkir, at tú í tí dagliga fert at arbeiða við at:
- gera uppskot til umhvørvisgóðkenningar
- røkja umhvørviseftirlit
- gera uppskot til reglur og kunngerðir innan økið
- gera fakligar metingar av umhvørvisfrágreið ingum frá feløgunum
- fylgja við í altjóða gongdini innan umhvørv isvernd.

Starvið er sera fjølbroytt og er bæði fakliga og persónliga avbjóðandi. Tú fært møguleika at menna teg til avbjóðingarnar, bæði innanhýsis og við skeiðum og vitjanum uttanlands. Aftrat hesum kemur møguleikin at luttaka í verkætlanum innan títt arbeiðsøki. Tú skalt kunna tola broytingar í starvsinnihaldinum.

Skikkað til starvið eru tey, sum hava lokið prógv innan umhvørvistøkni, náttúruvísund ella verkfrøði.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag, sí heimasíðuna hjá Lønardeildini, www.lnd.fo.

Umsóknir við avriti av prógvi, viðmælum, CV og tílíkum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 20. februar 2001.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Bárð Enni, stjóra, ella Jákup Paula Joensen, deildarleiðara.